gult34 cyan34 magenta34 svart34



**TIL SØLU**
Ekta japanskt Samurai svørð til sølu fyri 3900 kr. Videotól við fjarstýring 1200,- Nintendo 64 við trimum spølum 800,-
*Tlf. 421592*

**NÝGGJ BROSJA**
Nýggj óbrúkt brosja til sølu. Merki er »Víkingaskipið«.
*Tlf. 317673 e. kl. 18*

**GER KVETTIÐ!**
Kirby støvsúgvari, kann brúkast til millum annað massage, pussa og vaska, til sølu fyri 2.500, nýprísur ca. 13.000,- kr.
*Tlf. 319837*

**EYDNUHJÓL**
Árliga eydnuhjóli hjá B71 verður í ungmannafelagshúsinum »Virkinum« á Sandi tann 26. og 27. mai.
*B71*

**MYNDATÓL YNSKIST**
Lítið myndatól av tí gamla slagnum, automatiskt, uttan zoom ynskist bíliga.
*Tlf. 314538*

**ANDLITSSÓL**
ynskist til keyps.
*Tlf. 314671*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 7. maj. kl.19.00.
*Nevndin*

**TIL SØLU**
1 stk. »Hjemmet« 19092 stk. »Familie Journal« 19502 stk. »Billed Bladet« 1938 og 1946. Um eitt boð fæst.
*Tlf. 321915 – 220660*

**TIL SØLU**
Eitt kontór skrivaraborð 140 x 70 cm. 3 skuffur at læsa kr. 400,-
*Tlf. 321915 – 220660*

**TIL SØLU**
55 originalir filmar til sølu til hægstbjóðandi.
*Tlf. 422326*

**ÁRLIGI MARKNAÐAR-** DAGURIN Í SJÓNLEIKARHÚSINUMverður 5. mai. Hava tygum eitthvørt at lata okkum, taka vit ímóti 28. apríl kl. 13-17 á parkeringsøkinum eystan fyri Sjónleikarhúsið. Eisini ber til at ringja 217510, um vit skulu koma eftir lutum.
*Havnar Sjónleikarfelag*

# HEILSANIR



**Góði elskaði Petur**
Hjartaliga tillukku við 12 ára føðingardegnum 5. mai. Harrans signing í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Pól**



**Góði Jóan Petur**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum, nú er ikki leingi til tú skalt í skúla. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, Sonni, Elisabeth og Ári**



**Góði elskaði Leif**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Alt tað besta ynski eg tær.
**Heilsan Beinta xxx**



Øllum tykkum, sum vóru við til at gleða okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 24. mars 2001 við gávum, blómum, telegrammum, uppringingum, sangum talum, takka vit hjartaliga. Ein serlig tøkk til børn, svigarbørn, ommu-, abba-, langommu- og langabba børnum og tykkum sum vaktu okkum við sangi og gjørdu okkum dagin so hugnaligan. Eisini ein serlig tøkk til Mariu og allar kokkarnar sum løgdu alt so væl tilrættis. Eisini tøkk til Jóhann Mortensen, Sofus Hansen og Petur O. í Hoyvík. Tøkk øll somul fyri ein minniligan dag.
**Amy og Amon**



**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við teimum 40 5. mai. Eisini ein heilsan til gummu. Tillukku við 1 ára hjúnabandsdegnum 19. mai.
**Heilsan Robert, Sára og Helga**



**Góði Karl**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum.
**Heilsan mamma og Sigmund**



**Góði fitti Martin**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum í dag.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða Olga**
Lukku og gleði á tínum stóra degi.
**Ynskja starvsfelagarnir í Skálki**



**Góði Leif gubbi**
Lukku og gleði á tínum pipardegi, eisini ein heilsan til mostir.
**Bestu ynskir Bartal xxx**



**Góði Karl**
Hjartaliga tillukku við 16 ára degnum. Her ert tú ordiliga cool.
**Heilsan gita hvør?**



**Góði Jóhan**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum.
**Ynskja Bogi, mamma og babba**



**Góði fitti beiggi**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum í dag.
**Ynskir Bjarki**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Gleða okkum at síggja teg.
**Heilsan Irena og Heðin**



**Góða Dania!**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum 3. mai. Alt tað besta í framtíðini. Hopi at tú fær eitt gott kvøld leygarkvøldið.
**Kærar heilsanir Karolina**



Hjartaliga takka vit øllum, sum heiðraðu okkum á silvurbrúdleypsdegnum 24. apríl.
**Guðrun og Heini**


**Heilsanir** — 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................
........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ........................................................................
Bústaður: ........................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**


gult35 cyan35 magenta35 svart35



# TILTØK

## FØÐINGAR

6. apríl fingu Jónva Skoradal og Ali Asadi, Nykøbing F. eina dóttur ið eitur Elisa. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

12. apríl fingu Barbara og Otto Gram, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

19. apríl fingu Lilja og David Mørkøre, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3025 gr.

19. apríl fingu Petur og Beinta Nielsen, Froðba, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

21. apríl fingu Jóhanna Sólhey og Sjúrður Klakk, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3300 gr.

22. apríl fingu Durita Poulsen og Niels Pauli Tausen Bech,Vágur, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3460 gr.

23. apríl fingu Ranvá og Bogi Ragnarsson, Klaksvík, tvíburðar, gentu og drong. Gentan var 48 cm. long og vigaði 2650 gr., drongurin var 48 cm. langur og vigaði 2550 gr.

26. apríl fingu Pernille Krogh, Miðvágur og Óli Reynskor, Sørvágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4700 gr.

26. apríl fingu Janita og Hilmar Hansen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

26. apríl fingu Elin Nolsøe og Martin Øster, Tvøroyri, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3700 gr.

26. apríl fingu Bergtóra og Vagn í Geil, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

26. apríl fingu Sigurd og Marjun Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4100 gr.

27. apríl fingu Ingrid og Jákup Klein, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.

27. apríl fingu Beinta Mortensen og Jens Arne Sørensen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3100 gr.

28. apríl fingu Bjørg og Jóan Pauli Olsen, tvíburðar, gentu og drong. Gentan var 51 cm. long og vigaði 2900 gr., drongurin var 55 cm. langur og vigaði 3425 gr.

30. apríl fingu Duruta á Lofti og Regin Áki Hansen, Argir, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3800 gr.

30. apríl fingu Súsanna Kelduberg og Hans Andreas Joensen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3725 gr.

1. mai fingu Vónbjørt Sørensen og Bogi Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3100 gr.

1. mai fingu Heidi Poulsen og Jákup Heinesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4200 gr.

1. mai fingu Jónfríð og Jørmund Foldbo, Leirvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3650 gr.

2. mai fingu Anna Maria og Hans Leo í Bartalsstovu, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

2. mai fingu Anni og Arnfinn Olsen, Toftir, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3850 gr.

## ANDLÁT

**25. apríl**
Jóhan Hammer, Elduvík, 74 ár.

**26. apríl**
Aslaug Borðá, Froðba, 68 ár.

**02. mai**
Tummas Johannesen, ættaður úr Fuglafirði, 72 ár.

### Gudstænastur
***3. sunnudag eftir páskir***
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Norðskála:* kl. 17, altarg., Peter O. K. Olofson. Kirkjukaffi aftaná
*Gjógv:* kl. 11 messa
*Funningur:* kl. 12.30 messa Emil Olsen. (Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði og við Norðskála kl. 11)
*Gøta:* kl. 11, altarg., Kjartan Mørkøre
*Kvívík:* kl. 12, konfirmatión, Marjun Bæk
*Hvalvík:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Vestmanna:* kl. 11, Inga Polsen Dam
*Vágur:* kl. 11, Erland Beder
*Sandvík:* kl. 12, Ólavur Rasmussen
*Sandavágur:* kl. 11, David Johannesen
Leirvík: kl. 11,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs. (*Broytt kirkjutíð:* Frá komandi sunnudagi verður farið í kirkju kl. 11 í Leirvík og á Hellunum). Í Fuglafirði gongur talvan fyri KFS
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Dalur:* kl. 12, altarg., Jákup Reinert Hansen
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð

*Haldórsvíkar kirkja:* Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju kl. 11

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli og kl. 18 familjumøti, har eisini verður kunnað um virkið í Zarepta.
Mánadagin kl. 20.30 hittast ungu hjúnini hjá Marjun og Símun, Miðrás 7.

### Meinigheitin í Hoyvík
Fríggjakvøldið kl. 20 verður møti í Hoyvíkar skúla við Sytsir Tham frá Vietnam.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Systir Tham.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Oddmar og Gunnvør á Steig, Heinagøta 2. Øll eru vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 11 gudstænasta, kl. 14 sunnudagsskúli og junior, kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 familjumøti við náttverða, Leo-Hans og Sigrun Mikkelsen tala, Argjakórið syngur. Innsavnan til nýggju kirkjuna í Maradalinum í Tanzania.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Bárði Kass Nielsen
Týskvøldið kl. 20 venur Argjakórið
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Frelsunarherurin
Sunnudagin kl. 11 møti við Palla Petersen, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, major Tjåland talar.
Mánadagin kl. 17 skótar.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Barnaklubbur.
Leygardagin kl. 14-18 »Mans seminar« við Johannes Mulighus úr Danmark, ið er leiðari fyri CMN (Christian Mens Network) í Europa.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, barnaansing verður.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

### Ebenezer
Møtirøðin heldur áfram sunnukvøldið við evninum: Offrini í Gamla Testamenti – ein mynd av persóni og verki Harrans Jesusar 3 Mós. 1-8.
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti við evninum skyldoffrið, kl. 21 útimøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 15 brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin 6. mai. Eldrasamkoman og varðmenn fara útferð. Farið verður inn á Strendur. Sigið frá áðrenn leygardagin í KFUK á tlf. 311928 ella hjá Suna Joensen, tlf. 313409. Áðrenn vit fara, hittast vit í KFUK kl. 09.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, Johs. Andr. Næs sigur frá um Ólav úti í stovuni. Vit syngja og Oddvør Johansen spælir klaver. Tað er ikki neyðugt at vera limur, fyri at vera við.

### Vestmanna
Heimamissiónin hevur útimøti leygarkvøldið kl. 20 á torginum í Vestmanna við sangbólkinum Gittit o.ø.

### Zion, Kollafjørður
Møtirøðin við Høgna Johannesen og Regin Guttesen verður fríggjakvøldið 3. kl. 20.
Leygarkvøldið 4. kl. 20.
Sunnukvøldið 5. kl. 18.

### Filadelfia, Sundalagið
Í morgin kl. 18 kvøldmøti.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 19 møti har ungfólk luttaka, barnaansing. Drekka og innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Skála meinigheitshús
Vegna ungdómslegu við Gjógv, verður einki ungdómsmøti leygarkvøldið.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti. Streingjakórið og lovsongsbólkur luttaka. Innsavning til húsið. Aftaná verður hugnalig samvera í ungdómssalinum.

### Ørkin, Saltangará
Evangel. møti verður í Arbeiðarafelagshúsinum »Hæddini« í Saltangará sunnudagin kl. 17.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19 í Saltangará hjá Anthony og Charles. Verið hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Tham frá Vietnam.
Sunnumorgunin kl. 11 morgunmøti við Tham.
Barnamøti kl. 11. Tú ert vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.

### Elim, Søldarfjørður
Hugnaløta fyri ung og eldri verður í kvøld kl. 21. Tala við Svenning av Lofti og tónleikur við Jóannes og fleiri. Eisini verða vitnisburðir. Drekka verður aftaná.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Úr morgunlestrunum hjá Torgarð presti.**

*Men alt er frá Gudi, sum gjørdi okkum sáttar við seg við Kristi og gav okkum sáttargerðartænastuna.*
*2. Kor. 5,18*

Tað er ein avgjørdur kristin boðskapur, at Kristus er deyður fyri øll. Tað ræður tí um trúnna á, at bara hetta fullgjørda verk hansara reinsar okkum frá allari synd. Gud gjørdi okkum sátt við seg við Kristi.

Í Hebrearabrævinum verður sagt: »Tá latum okkum ganga fram fyri Gud við sonnum hjarta, við fullari trúarvissu, tá ið vit hava fingið hjørtu okkara reinsað frá ringari samvitsku«.

Gud vil geva okkum eina samvitsku, sum er reinsað, og hann er eisini førur fyri tí við Kristi fullgjørda verki. Vit eru við tí reinsað frá syndarinnar sekt og skuld. Fyri okkum skuldi tí fyrigeving syndanna verið tað størsta av øllum.

Tað merkir ikki, at vit eru lýtaleys – tíansheldur syndafrí. Men tað merkir, at við hesum boðskapi fáa vit at vita – við øllum tí, sum liggur á samvitsku okkara – at Gud gjørdi okkum sátt við seg við Kristi.

Síðan verður sagt í hesum skriftorðinum, at Gud hevur givið okkara sáttargerðartænastuna. Vit eru tískil sendiboð í Krists stað, sum var tað Gud, ið áminti við okkum. Vit biðja í Krists stað: Verðið sátt við Gud.

Tá ið vit hoyra boðskapin um, at Kristus er deyður fyir øll og trúgva hesum boðskapi, kann tað ikki annað enn skapa gleði og tøkk í hjørtum okkara. Okkum øllum eigur at leingjast eftir, at menniskju fara at liva í tøkkini um ta frelsu, sum er veitt okkum við boðskapinum um Jesu Kristi fullgjørda verk.

Øll vit við gleði halleluja kvøða
hjarta várt skal fyri Gudi seg frøa.
Syndir hann strikar, og skuldir hann sættir
sárastu sorgir av hjartanum lættir.